

# Bryan Rice hevur røddina

Bryan Rice hevur í nógv ár verið virkin í donskum tónleiki sum kórsangari og annað. Men á heysti í 2005 kom knappliga ferð á yrkisleiðina hjá honum. Bryan Rice spældi ein sang inn til filmin Nynnes Dagbog, og tá Remee frá plátufelagnum Boom! Records hoyrdi Bryan Rice syngja fyrstu ferð var leyst og liðugt.

- Eg gjørdi sáttmála við hann, uttan at hava hitt hann. Eg kendi hann ikki, og eingin kendi hann. Hann arbeiddi í móttøkuni á Hotel Scandic, men eg ivaðist ikki í hansara møguleikum. Tað eru nógv ár, síðani eg havi hoyrt ein danskan sangara við so stóru altjóða potentiali sum Bryan Rice, sigur Remee.

Síðani hevur Bryan Rice givið eina fløgu út, og hann hevur havt eitt risahitt við sanginum No Promises, sum hann sjálvsagt fer at framføra til Planet Awards leygarkvøldið.

**nud**




# Stórur áhugi í Planet Awards og gittara

Føroya Banki, ið er høvuðsstuðul hjá Planet Awards, skipar fyri kapping í sambandi við Planet Awards, áhugin fyri kappingini er sera stórur.

Í sambandi við Planet Awards skipar bankin á heimasíðu síni fyri eini spennandi kapping millum tey vitjandi á heimasíðuni. Møguligt er at vinna ein spildurnýggjan Gretch Electromatic el-gittara við tasku og heili 25 atgongumerki til gallakvøldið 27. januar. Áhugin fyri at luttaka hevur verið ovurhondsstórum longu nú hava yvir 1000 fólk luttikið í kappingini.

**nud**



# 200 út um landoddarnar

**Leygarkvøldið er 200 ein av bólkunum, sum framførur á Planet Awards, bólkurin er eisini í uppskoti til planetina fyri besta bólk, ein heiður, ið bólkurin vann í fjør. Tá ljóðførini eru pakkaði niður eftir konsertina, gongur leiðin uttanlands til konsertir í Noregi og á Christiania í februar.**

PLANET AWARDS
**Niels Uni Dam**
nielsuni@sosialurin.fo

200 er í løtuni Føroya besti bólkur, henda heiður fingu teir á Planet Awards í fjør, og í øllum førum inntil leygarkvøldið, eiga teir hetta heitið. Bólkurin er aftur í ár í uppskoti til somu planet, og hava tí møguleika at halda fast í heitinum. Tí er tað heldur ikki undrunarvert, at bólkurin verður millum teir, ið spæla á ársins veitslu á Hotel Føroyum leygarkvøldið.

## Føroyskur punkútflutningur

Onnur enn føroyingar hava lagt til merkis dygdirnar hjá 200. Í næstum spælir bólkurin 2 konsertir í Noregi og eina á Christiania.

Konsertin hjá 200 á Christiania er á legendariska spælistaðnum Loppen. Hetta spælistað hava teir í 200 áður vitjað sum partar av bólkinum Mold.

## Størsta skandinaviska tónleikamessa

Konsertirnar í Noregi eru í sambandi við størstu skandinavisku tónleikamessuna BY:Larm, sum í ár verður hildin í Trondheim. Umframt 200 spælir eisini Eivør Pálsdóttir á By:Larm. Eivør vann heiðurin ársins songkvinna á Planet Awards í fjør og er í uppskoti til sama heiður í ár. By:Larm er eitt slag av messu, har almennar tónleikaframførslur verða sameindar við viðkomandi fyrilestrum, seminarum og kjakfundum, ið eru fyri messugestirnir. Tónleikaprofilurin er í stóran mun norðurlendskir bólkar, ið bjóða umheiminum av.

## Ætla at vitja øll norðurlond

Niels Arge Galán sangari og gittarleikari í 200 segði herfyri, at bólkurin vónar at framføra í flest øllum Norðurlondum í 2007. Tað er eingin ivi um, at luttøkan á By:Larm kann hjálpa við at røkka hetta mál.

## Umheimurin elskar 200

Framførslur á Iceland Airwaves, Nipiaa Rockfestival, í Nasa í Reykjavík, Roskilde Festivalinum, Nordatlantisk Musikfestival, á Spot Festivalinum og í handlinum hjá 12 Tónum í Keypmananhavn, í Vega í Keypmannahavn hava longu sannført nógv útlendsk oyru um, at føroyskur punk/rokkur er nakað heilt serligt. Við stórum og víðagitnum bookingarfelag í rygginum er bólkurin vorðin eitt av teimum spennandi norðurlendsku nøvnunum, ið tey kønu hava eyguni eftir. Við fløguni Graceland hevur 200 lagt seg eftir einum altjóða ljóði og umheimurin elskar tað.